Nr. 18 • juli 2013

# MIÐ & MAGN



Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið

**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum og teimum, sum tekna hald.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus, *ábyrgdarblaðstjóri*
Páll Hansen
Regin Nónstein
Jóan Petur Patursson

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 314718
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 316973
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til:
info@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið, tað er fyri 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Venjingarhøll í Sjónámi

**PDF ÚTGÁVA**
Mið og Magn kann ókeypis heintast sum PDF á:
www.fsn.fo
www.mf.fo

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

Upplag: 1.800

# 20. august kemur MLC sáttmálin í gildi



*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdarblaðstjóri*

Hetta er dagurin mong hava bíða eftir í mong ár. Hesin millumtjóða sáttmálin skal forða fyri sosialari dumping á heimshøvunum. Eisini skal hann tryggja javnbjóðis kappingarstøðu millum heimsins siglandi tjóðir.

ST felagsskapurin International Labour Organisatiation (ILO) hevur samtykt MLC sáttmálan. Hetta stendur fyri Martime Labour Convention, og er ein samanskriving av øllum samtyktum ILO konventiónum so at hesar nú eisini galda á sjónum. ILO er eitt 3 partafelagskapur har stjórnir, arbeiðsgevarar og fakfeløg eru umboðað.

Í mong ár hava vit havt stórar trupulleikar á heimshøvunum orsaka av, at summi lond hava als ongar reglur um hvørji sosial rættindi sjómenn skulu hava. Hetta hevur ført til eina sera ójavna kappingarstøðu, sum eingin hevur kunna gjørt nakað við. Altjóða fakfelagsrørslan hevur í mong ár roynt at tvinga reiðarar at halda nakrar minimustreytir, men løggávan í nógvum londum hevur forða hesum arbeiði.

Arbeiðið við MLC byrjaði í 1990, og hann var samtyktur í 2006. Hann kundi fyrst koma í gildi 1 ár aftaná, at 30% av heimstonnaguni og 35 lond høvdu góðkent hann. Tað kann undra mong, at ES londini ikki vóru við í samtyktini. Hetta kann komast av, at fleiri av ringastu skiparegistarum eru í fyrrverandi fronskum, hálendskum, bretskum og týskum hjálondum.

Heilt ítøkjuliga merkir MLC, at nú skulu øll handilsskip hava 2 MLC sertifikat umborð, tað fyrra skal prógva, at flaggstaturin livur upp til krøvini. Tað seinna er eitt prógv uppá, at einstaka reiðaríið hevur mannagongdir, sum tryggja manningini tey rættindi, sum sáttmálin áleggur.

MLC verður ein partur at Port State Control í framtíðini, so umráðandi er at hava øll hesi viðurskifti í ordan. Vit kunnu vænta, at inspektørar fara at kanna um manningin fær hýru útgoldna regluliga, um manningarrúm eru rein og nosslig og um kosturin er nøktandi. Arbeiðsumstøður og trygdarviðurskifti kunnu eisini verða kannað.

Skip úr okkara parti av heiminum fara neyvan at hava torført við at uppfylla treytirnar í MLC, men tó kunnu tað altíð uppstanda misskiljingar um, hvussu ein uppfyllir allar treytir. Tað eru mong, sum vænta at skip úr teimum vánaligastu skipaskráunum so sum Mongolia, Kuba, Burma osv fara rættuliga skjótt at hvørva úr evropeiskum havnum. Føroyskir myndugleikar hava eisini heimild at kanna og afturhalda útlendsk skip um illgruni er um, at MLC treytirnar ikki eru uppfyltar.

Umráðandi er, at allir yvirmenn seta seg væl inn í nýggju reglarnar, so forðast kann fyri misskiljingum og óneyðugum afturhaldingum í fremmandum havnum. Klassafeløgini fara at útskriva MLC prógvið til reiðaríini. Vit mæla øllum til at taka væl ímóti nýggju reglunum, tær eru heilt víst til okkara fyrimun, hóast hetta gevur nakað av eyka arbeiði.

*Vegna Mið og Magn*
*Eyðstein Djurhuus , ábyrgdarblaðstjóri.*







# Innihaldsyvirlit

20. august kemur MLC sáttmálin í gildi . . . . . 2
Hátíðarhald á Vinnuháskúlanum . . . . . 4
Jón Helmsdal: Ímóti streyminum . . . . . 8
Fjarlestrardepilin – útbúgvingar uttan mørk . . . . . 9
Heiðurslimur í Maskinmeistarafelagnum 80 ára føðingardag . . . . . 11
Páll Hansen: Útbúgvingarráð . . . . . 11
Klaksvíkar Sjómansskúli og
Trygdarmiðstøðin hava nú heiti Sjónám. . . . . . 12
Brennidepilin: Dan Ingi Andreasen . . . . . 16
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum . . . . . 18
Viðvíkjandi samlagstryggingini hjá limunum . . . . . 19
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum . . . . . 20
Royndur maskinmeistari rundar sjeyti . . . . . 22
Føðingardagar . . . . . 23
Føroyskir fiskimenn við útlendskum skipum . . . . . 24
Maskinmeistarar á norðurlendskum fundi í Føroyum . . . . . 26
Norðurlendsk Navigatørkongress á Viðareiði . . . . . 28
Stovnsrøkt við agni og húki . . . . . 31
Grønlandsfiskiskapurin tekur seg upp . . . . . 36









# Hátíðarhald á Vinnuháskúlanum

Fullsett var í høllini í Vinnuháskúlanum til hátíðarhald 28. juni, tá 51 prógv vóru handað maskinmeistarum, skiparum og skipsførarum.

Vilhjálmur Gregoriussen, skúlastjóri, bjóðaði vælkomin og varaskúlastjórin Petur Hans Dahl flutti fram røðu fyri teimum 51, sum høvdu lokið prógv og teimum, sum vóru komin saman til hátíðarhaldið.

Umboð fyri Maskinmeistarafelagið, Skipara- og Navigatørfelagið og onnur, sum tóku lut í hátíðarhaldinum hildu røðu og ynsktu teimum, sum høvdu lokið prógv tillukku og góðan byr nú útbúgvingin var lokin. Umboð fyri próvtakararnar tóku eisini orðið.

## Gestarøðari

Gestarøðari var Jóhan Páll Joesen. Í røðu síni segði hann m.a:

Tað er mær ein serligur heiður, ein serlig æra – ein serlig gleði, at kunna standa her í dag og siga nøkur fá orð í sambandi við, at tit nú eru lidnir við hendan partin av tykkara útbúgving.

Hví sigi eg tað: Jú, fyri tað fyrsta, so føli eg meg sum ein av tykkum. Mítt hjarta hevur altíð bankað fyri tí vegi, sum man valdi sjálvur sum ungur.

Havi roynt at siti í stólinum, sum tit nú sita í. Havi roynt at følt ta gleði og frøi, sum tit nú føla. Havi roynt at følt tað lættilsi, ella befríilsi, sum tað er at kunna taka henda tunga frakkan av, og vera klárur at taka ein nýggjan frakka uppá – taka við nýggjum avbjóðingum. Traðka út í lívið við nýggjum førningi, sum skal gera tykkum førar at náa tað, sum tit droyma um at náa tykkara lívsmál.

Hjartaliga tillukku við hesum sum tit hava nátt í dag, og øll hugsandi góð ynski til tykkum og tykkara.

At tað er mær ein serlig gleði at standa her og siga nøkur orð til tykkum í dag er eisini orsakað av nøkrum heilt øðrum.

Eftir mikið stríð og strev, var eg liðugur við skipsførara í januar 1977. Tá eg kom fram á gólvið, og høvuðssensor, sum tá var Jógvan á Dul, handaði mær pappírini segði hann við meg, umframt at ynskja tillukku: „Against heavy odds".

Ongantíð fyrr hava so nógv fólk verið til hátárhald í Vinnuháskúlanum





Jóhan Páll Joesen, gestarøðari



Páll Hansen heldur røðu

Hugsaði ikki so nógv um tá, hvat hann mundið meina við. Havi tó seinni funnið útav, at hann, umframt at sipa til mína vánaligu skúlagongd frammanundan, og at eg ikki var nakað flogvit, sipaði til mína staming, sum bæði tá, og seinni í lívinum, man hava verið ein av mínum størstu avbjóðingum.

Tí er tað eisini ein gleði fyri meg, at kunna standa her, og siga nøkur orð til tykkum. At gera nakað, sum fyrr var óhugsandi.

Hvat vil eg við hesum? Jú, eg vil eggja tykkum til ikki at lata nakað verða ein forðing fyri, at tit skulu náa tykkara dreymar og mál í lívinum.

Tit hava kanska ikki staming at stríðast við ella okkurt líknandi. Men tað, sum eg kenni til, so kunnu vit øll vera fongd við onkrum, sum vit halda kann avmarkað okkum so ella so.

Gloym tað, hygg frameftir og ikki lata nakað avmarkað tykkum í mun til nakað sum helst, sum tit seta tykkum fyri. Tit hava allar fortreytir fyri at kunna alt: Brúkið tær!

Eg veit at eg eri nokkso gammeldags og støvutur. Men eg farið at nevna eina lítla hugleiðing afturat, sum eg mangan hugsaði um, tá man sigldi sum trolaraskipari.

Fyrr, tá man skuldi avstað, tveitti man eina stóra rúgvu av trolgreiðum o.ø inn á dekkið áðrenn man mynstraði, og fór avstað. Hetta var ofta fram ímóti kvøldi, so menn gjørdu sjóklárt, fingu sær ein bita og tørnaðu so inn.

Morgunin eftir, tá menn høvdu sovið seg út, varð byrjað at rudda, seyma saman, spleysa og annars gera dekkið klárt til fiskiskap.

Tá vóru tað sjálvandi teir, sum høvdu verið við fyrr ella teir, sum høvdu meira erfaring, sum gingu undan í hesum arbeiði.

Úti í borðinum, ella ikki beint til fortreð, stóðu teir, sum vóru við fyrsta túr ella høvdu lítla erfaring. Teir vildu líka sum ikki blanda seg for nógv at byrja við, fyri ikki at gera nakað býtt beinanvegin.

Men av hesum nýggju unglingunum, var tað altíð ein ella tveir, sum stóðu eitt stig fremri enn hinir. Rættu líkasum hondina út til at halda í ella okkurt líknandi; bjóðaðu seg fram.

Legði man merki til, eitt ella tvey ár seinni, tá man leitaði eftir einum ábyrgdarmanni til okkurt serligt arbeiði, ella vit manglaðu ein trolbass, ja so var tað næstan altíð tann unglingin, sum stóð fremri hin fyrsta túrin, sum bleiv biðin. Tann, sum bjóðaði seg fram.

Veit at setan av fólki í dag gongur eftir heilt øðrum reglum og mannagongdum enn okkara gamla skipan gjørdi. Men, eg vil framvegis halda tað vera ein góðan eginleika og eggja til, at tit halda tykkum til – bjóða tykkum fram.

Takksamur fyri tíðina eg gekk á Sjómansskúlanum, takksamur fyri, at eg kundi vera her í dag, og takksamur fyri, at eg slapp at siga nøkur fá orð til tykkum.

Taki hetta sum eina heilsan frá einum gomlum næmingi frá Vinnuháskúlanum: Lat tykkum ikki avmarka av nøkrum, tit kunnu alt – og – bjóði tykkum fram.

Hjartaliga tillukku við próvnum. Øll góð ynski til tykkum og tykkara og havi tað øll gott.



Maskinmeistarar



Skiparar



Eyðstein Djurhus handar Hanus Inga Hansen virðisløn



Næmingaumboð tóku eisini orðið



Skipsførarar

# Teir, sum fingu prógv handað vóru:

## MASKINMEISTARAR:

Hanni Elnar Niclasen, Robert Andreasen, Jákup Andreasen, Jóannes Joensen, Bárður Johanneson, Høgni Nybo, Kristian B. Andreasen, Boas P. Hansen, Heri Hansen, Kristoffur Svabo, Bergur Jacobsen, Heri Midjord, Poul Heri Selfoss, Høgni Olsen, Jón Djurhuus, Símin M. G. Skorastein, Dánjal M. Holgarsson, Benjamin Mikladal og Eirikur Poulsen.

### Virðislønir til maskinmeistarar:

1. Boas P. Hansen, fototól frá BANK NORDIK.
2. Høgni Nybo, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.
3. Jákup Andreasen, lummaur frá Áhugafelagnum Antares.
4. Kristoffur Svabo, lummaur frá Áhugafelagnum Antares.

Fyri ídni lat A. P. Møller Robert Andreasen eitt gull ur.

## SKIPARAR:

Martin Heldarskarð, Olivar Johansen, Rúni í Homrum, Poul Hallur Davidsen, Steintór K. F. Djurhuus, Andreas Joensen Dahl, Sølvi T. V. Mortensen, Eyðun Brimstrond Leo, Tórfinnur Nielsen, Hans á Lag Jacobsen, Tróndur R. Gregersen, Hanus Ingi Hansen, Andreas Pauli Davidsen, Jóhan Højgaard, Dánial K. Christiansen, Kristian J. Thomsen, og Marner J. D. Ludvig.

### Virðislønir til skiparar:

1. Hanus Ingi Hansen, kikara frá P/F Thor.
2. Eyðun Brimstrond Leo, barometur og klokkusett frá Faroe Ship.
3. Andreas Joensen Dahl, barometur og klokka frá Faroe Agency.
4.

Fyri ídni lat felagið Antares Kristian J. Thomsen eitt lummaur.

## SKIPSFØRARAR:

Sigmar Sandoy Eyðsteinsson, Fróði Thomsen, Evald Norðberg, Henry Mohr, Heri Norðberg, Jón Ingi T. Jacobsen, Niklas G. Joensen, Jónleif Kass, Hallur H. Samuelsen, Pole Stenberg, Bjarni Nielsen, Rógvi á Lava Olsen, Bogi Joensen, Rúni Hansen og Eddie Strøm.

### Virðislønir til skipsførarar:

1. Sigmar Sandoy Eyðsteinsson, gull ur frá A. P. Møller.
2. Evald Norðberg, klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar.
3. Heri Norðberg, lummaur frá Antares.

Fyri ídni lat Søfartens Ledere Eddie Strøm ur, knív og pennasett.

Harumframt lat Føroya Skipara- og Navigatørfelag Hanus Inga Hansen ein sekstant fyri hægsta miðal próvtal.

# Jón Helmsdal:
# Ímóti streyminum

**Promotion of the participation of women in the maritime industry**
**Resolution 14**
**THE 2010 MANILA CONFERENCE**



Jón Helmsdal, lærari á Vinnuháskúlanum

Gjørdi av fyri tíð síðani at avdusta nøkur gomul siglingartól, ið eg havi liggjandi á loftinum. Ímillum hesi siglingartól var ein gamal uppslitin sekstantur – tær seinastu sólhæddirnar tiknar við hesum sekstantinum hava neyvan verið serliga eftirfarandi, tí tølini síggjast í besta føri illa og í ringasta føri slett ikki.

Sum eg dusti av, leggi eg merki til, at tað stendur skrivað við blýanti „Mrs. Taylor" innanvert á kassanum, sum sekstanturin liggur í. Hetta gjørdi meg forvitnan, og eg gjørdi av at kanna hetta nærri. Eg legði sekstantin undir luppin og royndi at lesa tað sum stóð rist niður í nógv slitna bogan – jú, har stóð „Mrs. Taylor 104 Minories London".

Men hvussu bar tað til, at eitt konufólk hevði fingið navn sítt rist niður í hetta týdningarmikla siglingartóli, sum sekstanturin jú var? Nóg frætt, at sekstanturin ikki var blivin blakaður fyri borð onkran dagin við vánaligum fiskiskapi. Hetta mátti kannast nærri, og eg setti meg í samband við enskan søgufrøðing.

Hann kundi siga mær, at Janet Taylor (fødd Lonn), var borðin í heim í 1804 í býnum Wolsingham norðarlaga í Onglandi. Fyrstu undirvísingina fekk hon frá pápa sínum Peter Lonn – hann var prestur og skúlastjóri, umframt at hann undirvísti í navigatión um kvøldarnar.

Tá ið Janet var 9 ára gomul fekk hon, við góðum stuðli frá Charlottu drotning, møguleika at fara í skúla í Ampthill, Bedfordshire.

Í 1830 giftist Janet við navigatiónslæraranum George Taylor – hann var tá 38 ára gamal og einkjumaður við 3 børnum.

Sum 31 ára gomul (í 1835) byrjaði Janet sín egna navigatiónsskúla, umframt at hon seldi sjókort og umvældi siglingartól.

10 ár seinni byrjaði hon sjálv at framleiða siglingartól á verkstaðnum – hon gjørdi millum annað eina nýggja útgávu av sekstantinum sum fekk góð skoðsmál bæði frá „the Royal Navy" og „the East India Company".

Hetta var eisini tíðin, tá ið stálskipini komu fram, og skjótt var Janet nógv umbiðin til at rætta kumpassir og at gera deviatiónstabellir.

Janet gjørdi seg eisini galdandi sum rithøvundur av nautiskum tabellum og navigatiónsbókum, og tað sum hon hevur útgivið innan astronomiska navigatión, er greitt prógv um hennara heilt serstøku evni.

Maður hennara George, hevði ikki eins góða viðgongd í sínum arbeiði sum Janet, men stuðlaði henni so væl hann kundi. George doyði í 1853, men Janet helt áfram at arbeiða til 1868 og doyði í 1870, 66 ára gomul.

Janet gekk ímóti streyminum, og megnaði ikki bert at skapa sær ein vinnuveg, men at skara framúr í eini fullkomiliga mannfólka ráðandi verð.

Tað er ilt at meta um, hví Janet valdi júst ta yrkisleið, sum hon gjørdi. Tað er tó nærliggjandi at hugsa sær, at lunnarnir longu vóru lagdir tá ið hon sum lítil smágenta hoyrdi pápan greiða frá um misvísning og streym.

Og kanska er tað júst á heimafrontinum vit skulu byrja at vísa á møguleikarnar í sjóvinnuni, eisini hjá konufólki.



"Mrs. Taylor 104 Minories London"

# Fjarlestrardepilin
# – útbúgvingar uttan mørk

Um miðjan apríl í ár byrjaði virksemi á Fjarlestrardeplinum í Vági, og eftir tveir mánaðir kann staðfestast, at tað er stórur áhugi millum føroyingar í at taka útbúgving umvegis fjarlestur.

### Bakgrund

Bakgrundin fyri at Vágs kommuna í januar 2013 gjørdi av at seta á stovn Fjarlestrardepilin, er gongdin í samfelagnum, har alsamt fleiri fáa sær útbúgving.

Ein heilt stórur partur av føroyska ungdóminum fer undir útbúgving eftir fólkaskúla og miðnámsskúla. Tær førleikagevandi útbúgvingarnar verða ofta tiknar á hægri útbúgvingarstovnum í Havn ella uttanlands, har tey nógvu útbúgvingartilboðini eru.

Henda gongdin førir við sær, at fólk flyta bæði úr útjaðaranum og úr Føroyum sum heild. Fyri Suðuroynna eins og landið sum heild, hevur hetta ført við sær at fólkatalið er minkað, tí nógv venda ikki aftur eftir lokna útbúgving.

Endamálið við Fjarlestrardeplinum er at geva fólki valmøguleika at taka alla ella partar av einari hægri útbúgving umvegis fjarlestur. Fyri ung í Føroyum merkir hetta, at tey ikki noyðast at flyta av landinum fyri at taka eina útbúgving. Hetta merkir, at okkara ungu ikki missa sambandið við lokaløkið í 4-5 ár ella fleiri. Og ikki minst, so merkir hetta, at økini kring landið ikki missa sín ungdóm av landinum.

### Hvørjar útbúgvingarmøguleikar bjóðar Fjarlestrardepilin

Fjarlestrardepilin er ein útbúgvingardepil, sum knýtir sambond millum fjarlesandi í Suðuroynni (og í Føroyum) og lestrarstað. Ein depil, sum hjálpir teimum, ið ætla undir útbúgving sum fjarlesandi, at finna útbúgvingarstað.

Fjarlestrardepilin er eitt tilboð til




*Fjarlestrardepilin hevur góðar umstøður í Vági.*

tey, sum ætla undir hægri útbúgving ella undir eina hægri ískoytisútbúgving. Harumframt er Fjarlestrardepilin eisini eitt tilboð til tey, sum ætla undir endurútbúgving og uppskúling.

Umframt heilar útbúgvingar, so bjóðar Fjarlestrardepilin eisini eina røð av stakskeiðum. Hesi stakskeið eru av ymiskum slagi og eru bæði á universitetsstøði, á miðnámsskúlastøði og á øðrum støði.

### Skeið og leiðbeining á Fjarlestrardeplinum

Umframt at bjóða útbúgvingar og skeið umvegis fjarlestur, so bjóða Fjarlestardepilin eisini aðrar tænastur til lesandi. Hvørt ár verða boðin skeið til lesandi í metodu, projektskriving og í uppgávuskriving. Hesi skeið hava til endamáls at styrkja um førleikarnir hjá lesandi í teirra lestrartíð sum fjarlesandi.

Fjarlestrardepilin bjóðar eisini leiðbeining til lesandi í lestrartíðini. Sum fjarlesandi kann tað oftani verða avbjóðandi at sita við uppgávum ella projektum, uttan at hava nakran at umrøða evnið við. Fyri at veita lesandi stuðul í slíkum støðum, hevur Fjarlestrardepilin skipað eitt leiðbeinaratoymið, sum lesandi kunnu fáa leiðbeining frá.

### Fjarlestrardepilin góð hølisviðurskifti í Vági

Fjarlestrardepilin heldur til á Vágsvegi 22 í Vági, har Fjarlestrardepilin hevur góð hølisviðurskifti. Á Deplinum kunnu lesandi gera brúk av bólkarúmum í smb. við bólkaarbeiðið. Eisini er stórt undirvísingarhøli, har skeið og fyrilestrar verða hildnir – og har kunnu lesandi eisini fylgja fyrilestrum og undirvísing á stórskíggja umvegis internetið.

Á Fjarlestrardeplinum er sjálvsagt internetsamband og prentari, soleiðis at lesandi hava øll neyðugt amboð til at kunna virka sum best í lestrartíðini. Sjálvsagt er eisini ein køkur á Fjarlestrardeplinum, sum ger at lesandi hava allar neyðugar karmar á staðnum.

Í verki verður Fjarlestrardepilin skipaður soleiðis, at øll lesandi við tilknýti til Fjarlestrardepilin kunnu fáa lykil og brúka hølini tá tey hava hug. Hølini verða opin fyri lesandi frá kl. 8.00 á morgni til kl. 22.00 á kvøldi.

### Fjarlestardepilin góða heimasíðu

Fjarlestardepilin hevur sjálvsagt eina heimasíðu. Á heimasíðuni ber til at kunna seg um hvørjar útbúgvingar og hvørji skeið Fjarlestardepilin bjóðar. Umvegis heimasíðuna ber til at seta seg í samband við Fjarlestrardepilin við spurningum og fyrispurningum um útbúgvingar á heimasíðuni og um útbúgvingarmøguleikar, sum enn ikki eru á heimasíðuni.

Á Fjarlestrardepilnum er samskipari, sum svarar øllum fyrispurningum sum koma. Samskiparin hjálpir eisini fólki í at finna útbúgvingina, sum tey kundu hugsað sær at farið undir, um útbúgvingin finnist umvegis fjarlestur.

Heimasíðan hjá Fjarlestrardeplinum er www.fjarlestur.fo





# Heiðurslimur í Maskinmeistarafelagnum 80 ára føðingardag

21. juli 2013 hevði Atli Jensen, heiðurslimur í Maskinmeistarafelagnum, 80 ára føðingardag. Hann er føddur í Kvívík 21. juli 1933.

Atli Jensen var formaður í Maskinmeistarafelagnum í 27 ár, frá 1962 til 1989.

Árini 1950 til 1954 var Atli í smiðjulæru hjá Wenzel Petersen í Havn.

Um hetta mundi var maskinmeistaraútbúgvingin býtt upp í tríggjar partar. Atli tók 1. part av maskinmeistaraútbúgvingini í Føroyum; 2. og 3. part tók hann árinini 1957-58 á maskinmeistaraskúla í Keypmannahavn.

Í 1958 sigldi Atli við donskum farmaskipi, og árini 1959-1961 sigldi hann við skipum hjá Skipafelagnum.

Í 1961 gerst hann stjóri hjá Bileftirlitinum.



Maskinmeistarafelagið ynskir Atla Jensen hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnum.

Páll Hansen:

# Útbúgvingarráð

Løgtingslógin um manning av skipum ásetur, at við fiskiskipi/handilsskipi við framtøkumegi millum 450-749KW er motorpassari kravdur.

Í hesum sambandi hava vit ein álvarsaman trupulleika nevniliga, at hendan útbúgvingin als ikki er til í Føroyum í dag; hon fór í søguna í 1996.

So her er ikki samsvar millum manningarlógina og útbúgvingartilboð.

Tað man vera eindømi, at ein tjóð, sum er so tætt knýtt at sjónum, sum vit eru, ikki hevur tilboð til tær útbúgvingar, sum krevjast til ein part av okkara flota. Hetta er einki minni enn ein stór skomm. Havi roynt at tosað við Mentamálaráðið um hetta mál, men har ræður bert ein stór líkasæla. „Tit kunnu geva frávik“ hevur man hoyrt frá teimum, ella „góðtak eina meritútbúgving“.

Trupulleikin her er, at tá man royndi eina meritútbúgving kundu teir menn, sum ikki vóru upptiknir av Vinnuháskúlanum spasera ella koyra niðan í Mentamálaráðið, og verða upptiknir eftir serligum treytum, og tað var knøpp helvtin.

### Vinnuháskúlin manglandi Útbúgvingarráð

Ein av uppgávunum hjá Útbúgvingarráðnum á Vinnuháskúlanum er at geva landsstýrismanninum ráð í øllum málum um útbúgving av fólki á sjónum. Ráðið eigur at viðgera størri broytingar í útbúgvingunum, og kann sjálvt taka mál til viðgerðar, og senda landsstýrismanninum niðurstøðuna.

Hettar ráðið hevur verið óvirkið í longri tíð, ja ár. Gott nokk við einum undantak í februar 2012.

### Mentamálaráðið er vitandi um hesa støðu

Ein roynd bleiv gjørd í mai 2013 at kalla ráðið saman. Hetta bleiv ikki til nakað, hvør orsøkin var, veit eg ikki. Men eg kann konstatera, at fleiri av ráðslimunum eru farnir í annað starv síðani teir vóru útnevndir, uttan at nýggir eru valdir í staðin. Her kemur líkasælan fyri teimum maritimu útbúgvingunum í Mentamálaráðnum til sjóndar.

Hetta kann ikki halda áfram; tað gongur út yvir útbúgvingarnar, men tað er kanska ynski hjá Mentamálaráðnum, at alt bara skal pínast niður.

# Klaksvíkar Sjómansskúli og Trygdarmiðstøðin hava nú heiti Sjónám

Klaksvíkar Sjómansskúli og Trygdarmiðstøðin hava í mong ár haft ótíðarhóskandi hølisumstøður. Ein partur av undirvísingini hevur verið í bygninginum, sum varð keyptur í 1972 til at hýsa Klaksvíkar Sjómansskúla, og ein partur av undirvísingini hjá Trygdarmiðstøðin hevur verið í leigaðum hølum.

Tí var tað í tøkum tíma, at alt virksemi var savnað í nýggjum bygningi á vestaru bryggju. Í hesum sambandi hevur alt virksemi hjá Klaksvíkar Sjómansskúla og Trygdarmiðstøðini fingið hepna heitið Sjónám.

## Tíðarhóskandi umstøður

Ein partur av nýggja bygninginum er í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini er inngongd, avgreiðsluhøli og 6 skúlastovur, sum allar hava samvirknar talvur.

Í ovaru hæddini eru skrivstovur hjá leiðara og starvsfólki.

Harumframt er ein stórur venjingarhøll. Har er hylur til venjingar, ið eru partur av fleiri skeiðum, sum Sjónám skipar fyri.

Hylurin og tilhoyrandi plattur eru framleidd í Írlandi. Hylurin er 3,5 m djúpur, og tvørmátið er 11 m. Í hylinum eru 328 m$^3$ av vatni. Vatnið er klorað og hitað upp til 20° C.



Hanus Kjølbro er deildarleiðari í Sjónámi.



Rúni Heinesen er stjóri í Sjónámi; stovnurin er skipaður sum sjóvinnuútbúgvingarøki undir Tekniska Skúla í Klaksvík. Á myndini høgrumegin stjórin, Rúni Heinesen, og mentamálaráðharrin Bjørn Kalsø.



Í venjingarhøllini ber til at eftirgera allar møguligar neyðstøður og veðurlíkindi við ljósseting, vindblásarum, eftirgjørdum regni og stýring av hitanum í vatninum. Eisini er útgerð at halda HUET-skeið, tað er venjing í bjarging úr søkkandi tyrlu.

## Venjingarhøll

Harafturat rúmar venjingarhøllin eisini skiftirúm til skeiðluttakarnar, turkirøðir til draktir, og goymsla av útgerð, sum verður brúkt í undirvísingini.

Stjóri í Sjónámi er Rúni Heinesen; stovnurin er skipaður sum sjóvinnuútbúgvingarøkið undir Tekniska Skúla í Klaksvík.

Hanus Kjølbro er settur deildarleiðari í Sjónámi; hann hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum. Umframt deildarleiðaran er eitt skrivstovufólk í fyrisitingini.

Sjónám bjóðar somu útbúgvingarnar sum Klaksvíkar Sjómansskúli og Trygdarmiðstøðin áður hava bjóðað.

## Skiparaútbúgving partur av Sjónámi

Í verandi skúlaári er ein skiparaflokkur. Skiparaútbúgvingin tekur 18 mánaðir og er samansett av vanligari talvuundirvísing og eini røð av skeiðum. Skeiðini eru ein kravdur partur av skiparaútbúgvingini, tí skulu øll skeið verða tikin fyri at standa skipararoyndina – tað er ikki nóg mikið bert at hava nóg góð próvtøl í teimum nógvu lærugreinunum.

Ein stórur partur av teimum, sum taka skiparaprógv halda áfram á Vinnuháskúlanum, har teir eftir hálvtannað ár taka skipsføraraprógv.

## Sjóvinnuflokkurin

Nógvir føroyingar hava tikið sjóvinnuútbúgving uttanlands, serliga í Danmark, men síðani 1991 hevur eisini verið møguligt at taka sjóvinnuútbúgving í Føroyum. Henda útbúgving, sum áður var partur av Klaksvíkar Sjómansskúla, er í dag partur av Sjónámi.

Talan er um eitt skeið, ið tekur 5 mánaðir. Skeiðið fevnir um ástøðiliga undirvísing t.d. siglingarlæra, rokning og skipstøkni. Harumframt fevnir útbúgvingin um ein verkligan part, sum t.d. praktiskan sjómansskap, arbeiðstrygd og viðlíkahald.

## Ein góð byrjan

Sjóvinnuflokkurin er ein góð byrjan hjá ungum fólki til eina lívsleið á sjónum. Men útbúgvingin er eisini ætlað teimum, sum hava siglt eitt ávíst áramál, og síðani byrja sjómansskúlalívið í sjóvinnuflokkinum.

Mangir útisiglarar eru byrjaðir í sjóvinnuflokkinum og eru so farnir at fáa sær siglingstíð t.d. við føroyskum fiskiskipi.

Eftir hetta velja teir mangan at taka skiparaútbúgvingina, og halda síðani áfram og taka skipsføraraprógv. Tá eru teir at síggja umborð á mongum útlendskum skipum – serliga undir norskum og donskum flaggi.

## Millumlandasáttmáli

Sjóvinnuútbúgvingin og skiparaútbúgvingin eru byggja báðar á millumlandasáttmálan, ið setir minstamark



*Sjónám hevur alla útgerð, sum krevst til at halda HUET-skeið; tað er venjing í bjarging úr søkkandi tyrlu. Á myndini eftirgjørda tyrlan, sum verður brúkt, tá skipað verður fyri HUET-skeiðum.*

fyri førleika til sjófólk (Standard of Training, Certification and Watcheeping – STCW).

Ásetingarnar í STCW verða støðugt broyttar, og skiparaútbúgvingin er dagførd tilsvarandi – seinast í fjør, meðan sjóvinnuútbúgvingin ikki er dagførd so títt síðan byrjanina í 1991. Tey flestu skeiðini, ið takast kunnu á Sjónámi, eru krøvfest í STCW-sáttmálanum.

## Trygdarskeiðini

Søgan um trygdarskeið í Føroyum byrjar í Klaksvík Sjómansskúla seinast í 1980-unum. Tá fór skúlastjórin undir at skipa fyri skeiðum. Og eftir at løgtingið hevði samtykt, at allir fiskimenn umborð á føroyskum fiskiskipum skuldu hava trygdarskeið, gjørdust skeiðini alsamt fleiri. Hesi skeið vóru partur av sjómansskúlanum til 1998, tá Trygdarmiðstøðin sá dagsins ljós.

Sjónám (Trygdarmiðstøðin) hevur verið veitarin av trygdarskeiðum til nógvar føroyskar sjómenn – og eisini at endurnýggja skeiðið eftir, at tað er útgingið 5 ár seinni. Trygdarskeið – grundskeið og endurnýgging – eru framvegis høvuðstátturin í virkseminum Sjónáms.

## Bátaførara- FRCskeið

Tey seinni árini eru – eitt vaksandi tal av føroyingum – farnir úr fiskivinnuni til útlandið at sigla. Serliga til Noregs. Hetta hevur havt við sær, at Sjónám hevur hildið nógv fleiri bátaføraraskeið og FRCskeið enn undanfarin ár. Hesi skeið hava verið partur av virkseminum síðan 2001.

## HUET: Helicopter underwater escape training

Í februar 2011 gjørdi Sjónám licens-avtalu við Maersk Training í Esbjerg (MT) um skeið til fólk í frálandavinnu. Talan er í fyrsta lagi um skeið, sum er ætlað til tey, sum sigla við veitingarskipum, ið hava tyrlupall.

Skeiðið tekur ein dag og nevnist HUET (helicopter underwater escape training). Fyrsta skeiðið varð hildið í januar 2012, og síðani tað hava verið 23 skeið fyri føroyingum.

Áðrenn hetta var neyðugt at fara uttanlands at taka HUET. Tá var vanligt, at skeiðluttakarin mátti vera burtur í 3 dagar.



*Nógv teknisk útgerð*

## OBST: Offshore basic safety training

Licens-avtalan við MT fevnir eisini um OBST (offshore basic safety training). Hetta er trygdarskeið til fólk, sum arbeiða á boripallum. Tað fyrsta av hesum skeiðum varð í februar í ár.

HUET og OBST eru á skeiðætlanini hvønn mánað, men tað er komið meiri enn so fyri, at eykaskeið hava verið.

Bæði skeiðini til fólk í frálandavinnu byggja á danska kunngerð um tilbúgving á boripallum, sum verður umsitin av orkumálaráðnum í Danmark (energistyrelsen). Skeiðini eru góðkend av grannalondum okkara.



*Sjónám er í stóra bláa bygninginum, sum er á Faktorsvegi 14 í Klaksvík.*

## Onnur skeið

Afturat hesum skeiðum er møguligt hjá Sjónámi at skipa fyri øðrum skeiðum. Her verður m.a. hugsað um radioskeið til sjófólk (GOC, ROC, SRC og LRC). Hesi skeið eru ikki sett á skeiðsætlanina, men verða hildin eftir tørvi. Sjónám kann eisini skipa fyri skeið í fyrstuhjálp og í arbeiðsumhvørvi (§16).

Ætlanin er eisini at skipa fyri øðrum skeiðum í framtíðini.

Tað støðugt vaksandi talið av føroyingum við útlendskum skipum setur krøv. Tað sum liggur í stoypiskeiðini í løtuni eru skeiðini í víðkaðari fyrstuhjálp og sjúkuviðgerð. Ætlanin er, at hesi skeið verða partur av virkseminum í 2013.

Samstarv er fingið í lag við Vinnuháskúlan um at halda IMO60 og IMO80. Miðað verður eftir, at hesi skeið eru komin á breddan í ár.

## Leiðsla og starvsfólk

Í Sjónámi arbeiða 11 fólk fulla tíð. 7 lærarar og skeiðhaldarar undirvísa fulla tíð, umframt at neyðugt hevur verið at hava eyka fólk eftir tørvi. Harumframt er umsiting, húsavørður og vaskifólk.

Undirvísararnir skulu hava útbúgving sum annaðhvørt skipsførari ella maskinmeistari. Hesir hava eisini royndir úr arbeiðslívinum á sjónum, og hetta hevur víst seg at vera ein góð samanseting, tá ið undirvísing til skipara, sjóvinnuflokk og tey ymisku skeiðini umræður.

## Deildarleiðari og lærarar

- Hanus Kjølbro: Deildarleiðari
- Janus Joensen: Skeiðlærari
- Brandur Klettskarð í Kongsstovu: Skeiðlærari
- John Mikkelsen: Skeiðlærari
- Bárður Lydersen: Skeiðlærari
- Anton Højgaard: Lærari
- Pole Mikkelsen: Lærari

# Dan Ingi Andreasen


Jacob Petur Johannesen

**Føddur 14. juli 1964**

**Børn:** Kona mín, Húngunn í Dímun Højgaard og eg eiga tvey børn: Ása, ið er 20 ár og Jógvan, ið er 18 ár.

**Starv:** Skipari á Esvagt Contender hjá Esvagt í Esbjerg. Hettar er eitt av C-skipunum, sum er bygt í Singapore og er eitt ERRV skip við DP-1 og FiFi.

**Útbúgving:** Eg var liðugur við fólkaskúlans 10 ára skúlagongd á sumri 1981, og fór tá til skips. Eftir tvey ár á sjónum fór eg í læru sum typograf, har eg so eitt skifti var í Herning á tekniskum skúla, men hugurin til sjógvin var so stórur, at eg og mín lærimeistari samdust um at steðga samstarvið. Hevði so tilknýti til sjógvin fram til 1991, tá eg so fór á skúla í Havn. Tað fyrsta árið gingu vit eftir einari skipan sum nevndist „Vaktofficer" sum bert skuldi taka eitt ár, men so komu spurningarnir hvat hesir vaktofficerar kundu brúkast til og hvør vildi hava teir umborð. Teir kundu jú bara sita á vakt undir sigling og so var einki prógv at fáa, bert eitt A4 ark við nøkrum royndar tølum.

So har var bert eitt at gera og tað var at fáa skipsførara prógv. Á jólum í 1994 var eg so skipsførari.

**Hvussu eru útlitini hjá skiparum:** Útlitini eru góð. Hugsa vit um oljuvinnuna, so eru størv at fáa í Noregi og Danmark, eisini eru føroyingar væl við innan hesa vinnu. Tí verri stendur ikki so væl til hjá heimaflotanum, harav eru ikki so mong fiskiskip longur.

**Hvat er størsta avbjóðingin hjá einum skipara í dag:** Tað er ein avbjóðing í sær sjálvum at vera skipari, tá hugsað verður um trygd á sjónum og øll tey altjóða krøv, ið eru galdandi innan hettar øki. Har legst bert meira og meira pappírarbeiði afturat.

**Fyrstu ferð til skips:** Í 1981 við nótabátinum Ísborg.

**Hvørjum skipum hevur tú verið við:** Nótabátunum Ísborg, Krúnborg og Havlot. Trolarunum Oknin og Olaf í Garðastovu. Strandfaraskipunum Teistin, Smyril (gamli og nýggi), Dúgvan, Sam, Ritan og Pride. Bulkskipinum Arunto í Norra.

**Longsti túrur til skips:** Mynstraði við M/S Ísborg á Havnini um hálvan juni 1981, ið eisini var mín fyrsti túrur til skips. Vit komu aftur á havnina umleið 20 september.

**Frítíðarítriv:** Havi seinastu árini umvælt heima við hús. Tá ið byggiárið er 1966, er altíð okkurt at takast við, men nú eri eg við at koma uppundir land við tí.

**Bilur:** Toyota Yaris „Hybrid".

**Telda:** Dell fartelda.

**Besta bók:** „Jól á halanum" hjá Hans Paula, „Júst í Túni" og „Myten Mærsk" eru nakrar sera áhugaverdar bøkur.

**Besti sangur:** „Dýrd á vík og vág"

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:** Tá ið alt gongur sum ætlað. At míni nærmastu hava góða heilsu, og at tað gongst teimum væl.

**Hvat kann øsa teg í gerandisdegnum:** Tá fólk ikki passa seg til tíðina, og so allar hasar ólukksáligu endursendingarnar í Útvarp Føroya. Og tað at Útvarpið ikki hoyrist út um landoddarnar. Hurrá fyri sendaranum á Akrabyrgi.

**Um skiparan og maskinmeistaran**

Tað er sjálvandi brúk fyri báðum umborð.

Einaferð segði ein maskinmeistari, at vit á brúnni ikki skuldu óttast, tí „Meistarin er við tykkum".



Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari



## Spennandi og fjølbroyttar útbúgvingar

### og eitt hav av eftirútbúgvingarmøguleikum

**Dømi um skeið:**

1 ARPA skeið
ARPA Automatic Radar Plotting Aids

2 GOC (Generelt og endurnýggjan)
GOC General Operator Certificate (NEW)

3 Tankers Safety serskeið fyri olju-gas- og kemikaliutangakip
Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers

4 Flutningur av vandamiklum farmi
Transport of dangerous goods in dry cargo ships

5 Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)
Supplementary training in medical proficiency

6 ECDIS (elektroniskt sjókort)
Course in Elektronic Cart Display Indication System

7 SSO-skeið
Course for Ship Security Officers

8 Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3,A-VI/1-4
Basic safety training

9 Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1
Proficiensy in Servival Craft and Rescue boats

10 Bridge Resource Management
Bridge Resource Management

*Set teg í samband við skúlan og hoyr nærri.*

KREA

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

BROT ÚR DAGBÓK



# Tíðindi frá Skipara- og Navigatør-felagnum:

**12-04-2013 Vinnuhúsið**
Sáttmálasamráðingar fyri farma og frálandaskip halda fram.

**15-04-2013 Starvsmannafelagið**
Fundur um keyp av Lívstrygging. Kunnað varð um ymisk roknskaparviðurskifi og treytir frá Tryggingareftirlitinum um ætlaða keypið.

**16-04-2013 Vinnunevndin**
ALS stýrið varð boðið í Vinnunevndina at siga sína hugsan um tvey lógaruppskot, sum viðvíkja ALS. Stýrislimirnir høvdu ymiska áskoðan um lógaruppskotini.
1704 Fiskivinnuráðið
Kunngerð um býti av botnfiskakvotuni í Grønlandi var til umrøðu.

**18-04-2013 FSN**
Fundur við Páll Nielsen advokat um ymisk limamál.

**18-04-2013 FF**
Manningarfeløgini hitta Nótaskip og tosa saman um tilfeingisgjøldini skulu verða partur av sáttmálanum ella ikki. Manningarfeløgini halda fast við at Nótaskipini skulu hava somu ásetingar sum restin av flotanum um hesi viðurskifti.

**19-04-2013 Áarstova**
Nevnd og starvsfólk við makum hittist til at hátíðarhalda 70 ára føðingardagin hjá Regin Nónstein næstformanni.

**22-04-2013 Fiskivinnuráðið**
Fundur í Fiskivinnuráðnum.

**25-04-2013 Vágur**
Feløgini vitja umborð á Grunnabarð. Manningin og umboð fyri reiðaríið fáa kunning um, hví hetta skipið ikki kann hava ein øðrvísi sáttmála enn onnur skip. Vit hava tó boðið teimum, at teir kunnu brúka sáttmálan fyri alternativa veiðu (25 %) meðan teir royna eftir hvítingsbróðuri. Seinni sendi reiðarin okkum eitt undirskrivað eintak av sáttmálanum.

**30-04-2013 Fiskivinnuráðið**
Framhaldandi viðgerð av makrel og sildakunngerðini. Uppskot um at loyva avmarkaðari snelluveiðu á Føroya Banka fekk viðmæli frá ráðnum.
Allan mai mánað var formaðurin burturstaddur vegna sjúku. Hann fekk skurðviðgerð fyri ov trongar æðrar í hjartanum. Fundarvirksemi hevur hetta tíðarskeiði verið sera avmarkað.

**29-05-2013 Vinnuhúsið**
Samráðingar fyri farma og frálandaskip.

**31-05-2013 Østrøm**
ALS heldur ársfund, har kunnað varð um virksemi roknskapin osv. Uml. 100 fólk vóru møtt.

**31-05-2013 FSN**
Sersáttmálarnir fyri Næraberg og Slættaberg verða longdir.

**03-06-2013 Havstovan**
Vinnan fær kunning um stovnsmetingar og æti/gróður kanningar. Ongantíð fyrr hava útlitini verðið so vánalig sum nú fyri botnfiskastovnarnar.
Frægari sær tó út við teimum pelagisku stovnunum. Nakað av orðaskifti var um hvør orsøkin mundi verða. Ongin semja fekst, annar parturin helt fast við ovurveiðu, og hin parturin, at makrelur og sild etur bæði yngul og føði undan botnfiskastovnunum.

**04 og 05-06-2013 Viðareiði**
FSN er vertur fyri Norðurlendsku Navigatørkongressini. Veðrið var av tí fagrasta hesar dagarnar, ráðstevnan eydnaðist sera væl. Tó mátti Ísland geva avboð vegna serligar umstøður.

**06-06-2013 Vinnuhúsið**
Sáttmálsamráðingarnar halda áfram

**11-06-2013 ALS**
Fundur í stýrinum.

**11-06-2013 Hafnina**
NORLines hevið bjóða FSN at hava eitt innlegg á teirra officerskonferancu. Reiðaríið hevur 9 skip í FAS og flestu yvirmennirnir eru føroyingar.

**12-06-2013 Dómhúsið**
Fyrireikandi fundur um tvingsilsølu av M/S Saga. Manningarfeløgin hava lagt hýru út fyri manningina, og hava tískil eitt stórt sjóveðrættarkrav í skipinum. Sølan verður 21. August.

**14-06-2013 Vinnuhúsið**
Semja verður umsíðir gjørd fyri farma og frálandaskip.

**17-06-2013 MF**
Feløgini hitta Hans Jóhannus á Brúgv stjóra á FAS og Skipaeftirlitið. Vit umrøða tað negativu umtalu, sum FAS fær frá útlendskum sjómannafeløgum. Feløgini greiða frá, at hendan misnøgdin fer bert at økjast um FAS heldur áfram við at „taka" skip frá skipaskráunum í okkara grannalondum. Feløgini mæltu til, at vit heldur skulu satsa uppá færri skip, men at tey sum koma undir FAS mugu leggja størri part av sínum virksemi her hjá okkum. Eisini umrøddu vit, hvat skal til fyri at fáa FAS burtur av listanum yvir hentleikafløgg hjá ITF (FOCListin).

**26-06-2013 Fíggjarmálaráðið**
Semja verður gjørd um at leinga SSL sáttmálan fram til 1. oktober í ár.

**27-06-2013 Fiskivinnuráðið**
Nýggj kunngerð um garnaveiði er til ummælis. Eisini er ein nýggj kunngerð um hummaraveiðu til ummælis.

**28-06-2013 Vinnuháskúlin**
Hátíðarhald í Vinnuháskúlanum har 55 prógv vóru handað.

# Viðvíkjandi samlagstryggingini hjá limunum

Inngjøld til LÍV fyri samlagstryggin hjá limum okkara hava higartil verið goldin sum serstøk gjøld.

Fyri mánaðarløntar persónar hevur gjaldið verið kr. 350 um mánaðin og fyri persónar, sum eru mynstraðar við fiskiskipum, hevur gjaldið verið kr. 27 pr. útmynstringardag.

Tað hevur víst seg at vera sera umfatandi arbeiði av hesari skipan og feløgini hava tí saman við LÍV arbeitt við at finna fram til ein einfaldari hátt at umsita hetta.

Vit eru komin til ta niðurstøðu, at taka av verandi serstøku gjøld fyri samlagstrygging – bæði mánaðargjøld og daggjøld – og í staðin fer LÍV at draga gjald svarandi til kr. 350 um mánaðin burtur av inngjøldum til eftirløn hjá limum í nevndu feløgum.

Arbeiðsgevarar og reiðarar hava tí fingið boð um, at tey, við gildi frá 1. Januar 2013, ikki longur skulu draga nevndu mánaðargjøld og daggjøld av lønini ella hýruni.

Um so er, at tygara eftirløn ikki verður goldin til LÍV, kunnu tygum kortini vera við í samlagstryggingini hjá yvirmannafeløgunum. Hetta kann gerast við, at tygum gera eina fasta flyting á kr. 350 um mánaðin á kontu nr. 6460-180.702.3.

## Niðursiglingarhýrur dagførdar 27. mars 2013

Útgangsstøði 1. mai 2012
Tímaløn 110,37
Tímaløn 113,79

| | | |
|---|---|---|
| Skipari | kr. 2.004 um dagin | kr. 2.080 um dagin |
| 1 stýrimaður | kr. 1.779 um dagin | kr. 1.846 um dagin |
| 2 stýrimaður | kr. 1.635 um dagin | kr. 1.697 um dagin |
| Maskinstjóra | kr. 1.981 um dagin | kr. 2.056 um dagin |
| 1. meistara | kr. 1.779 um dagin | kr. 1.846 um dagin |
| 2. meistara | kr. 1.635 um dagin | kr. 1.697 um dagin |
| 3. meistara | kr. 1.635 um dagin | kr. 1.697 um dagin |
| Motorpassara | kr. 1.779 um dagin | kr. 1.846 um dagin |
| Kokkur | kr. 1.779 um dagin | kr. 1.846 um dagin |
| Manningina | kr. 1.567 um dagin | kr. 1.626 um dagin |

**Útrokning av muni:**
Tímaløn frá 110,37 kr. til 113,79 kr.
Munur = 3,42 kr. sum svarar til eina øking á 3,774654 %

BROT ÚR DAGBÓK



# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum:

**27-03-2013 — FF**
Fundur í hølinum hjá FF á Bryggjubakka við Felagið Nótaskip. Annar fundur um nýggjan sáttmála. Tað varð eisini tosað um sáttmála fyri nýggja Christian í Grótinum.

**02-04-2013 — FF**
Framhald í hølinum hjá FF á Bryggjubakka við Felagið Nótaskip um nýggjan sáttmála.

**04-04-2013 — FF**
Fundur fyrrapartin við Reiðarafelagið fyri farmaskip um nýggjan sáttmála.

Seinnapartin fundur við Vinnumálaráðið um keypið av LÍV.

Eisini var nevndarfundur hendan dagin. Kunnað bleiv millum annað um aktuellu støðuna í LÍV keypinum,

SSL hvíldartíð og sáttmálasamráðing við RFF og Nótaskip.

**09-04-2013 — MF**
Fundur á skrivstovuni við álitismannin hjá IRF um aktuell mál.

**10-04-2013 — Skálatrøð**
Kunnandi fundur millum S/P Fakfelag og Tryggingareftirlitið um støðuna í tilgongdini í keypinum av LÍV.

**11-04-2013 — ALS-Húsið**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum um ásetan av minstuløn og minstaforvinningi.

**12-04-2013 — Vinnuhúsið**
Framhald av sáttmálasamráðingunum við Reiðarafelagið fyri farmaskip, á hesum fundinum bleiv serliga tosað um skip í frálandavinnuni.

**17/18-04-2013 — Grunnabarð**
Fundur umborð og á skrivstovuni hjá FF við reiðaran og partar av manningini um sáttmálaviðurskifti.

**25-04-2013 — Grunnabarð**
Framhald av fundunum, sum vóru í Havnini. Ein sera góður og áhugaverdur fundur umborð á Grunnabarð við bryggju í Vági, sum endaði við eini avtalu.

**14-05-2013 — MF**
Nevndarfundur í FMU. Eftirmeting av avtalun millum feløgini, partarnir vóru samdir um, at ikki var neyðugt at gera nakrar broytingar.

FMU hevði fingið fyrispurning frá ITF um skipið Cool Aster. Semja var um ikki at gera nakað við hetta málið. Eisini bleiv avtala at hava ein fund við Sjóvinnufyrisitingina í nærmastu framtíð.

**15-05-2013 — FF**
Framhald í hølinum hjá FF á Bryggjubakka við Felagið Nótaskip um nýggjan sáttmála.

**17-05-2013 — MF**
Fundur við umboð fyri SSL um hvíldartíð umborð á Smyril. Ongin avtala bleiv undirskrivað á hesum fundi, so hetta málið dregur út.

**17-05-2013 — MF: Nevndarfundur**
Kunnað bleiv um 5 mál. Aktuellu støðuna í LÍV, Grunnabarð, hvíldartíð umborð á Strandfaraskipum Landsins o.a.

8 mál vóru til støðutakan. Millum annað at fríðka ognina hjá felagnum. Gensidighetsavtale við okkara grannalond; hettar snýr seg um limaskap. Manglandi sáttmálar t.d. um nótaskip, Christian í Grótinum.

**22-05-2013 — FF**
Framhald í hølinum hjá FF á Bryggjubakka við Felagið Nótaskip um nýggjan sáttmála. MF boðaði frá á hesum fundi, at vit vildu framleingja verandi sáttmála árið út.

**27-05-2013 — Ánirnar**
Fundur við P/F Hvalnes um avtalu fyri Norðborg og Christian í Grótinum. Partarnir vóru stórt sæð samdir á hesum fundi.

**29-05-2013 — Vinnuhúsið**
Framhald av sáttmálasamráðingunum við Reiðarafelagið fyri farmaskip, á hesum fundi fóru partarnir undir at gera lønartalvurnar.

**30-05-2013 — MF**
Gjørdu avtalu fyri Næraberg árið út, tað er sama avtala, sum bleiv undirskriva fyri nótaskip.

**31-05-2013 — Østrøm**
Ársfundur hjá ALS. Á fundinum bleiv greitt frá um arbeiðsloysið og teimum avbjóðingunum, sum arbeiðsloysið er. Eisini bleiv ársroknskapurin lagdur fram og greitt bleiv frá, hvussu ALS arbeiðir við hesum avbjóðingum. Samanumtikið ein sera góður og áhugaverdur fundur.

**31-05-2013 — Advukadvirkið**
Fundur við Páll Nielsen um ymisk limamál og tvingsilssølu av Saga.

**04-06-2013 — MF**
Fundur við IRF um ymiskar sáttmálatulkingar.

**05-06-2013 — Hotel Føroyar**
Kunnandi fundur um Skálafjarðartunnilisverkætlanina. Verkætlanin verður mett at kosta umleið 1,1mia. kr, ætlanin er, at sjálv verkætlanin byrjar fyrst í 2015 og er liðug í 2018.

**06-06-2013 — Vinnuhúsið**
Framhald av sáttmálasamráðingunum við Reiðarafelagið fyri farmaskip, og skip í frálandavinnuni. Á hesum fundinum bleiv nakað tosað um eginavtalur. Feløgini hava framsett ynski um, at limir fáa rætt til at fáa avtaluna dagførda so hvørt, sum sáttmáli verður dagførdur.

**06-06-2013 — Portugalið**
Fundur millum landsstýrismannin í vinnumálum og hansara embætisfólk, S/F Fakfelag og Ognarfelagið um framhaldandi tilgongd í LÍV keypinum.

**12-06-2013 — Sundsverkið**
Fundur millum umboð fyri MF og maskinmeistararnar á Sundsverkinum. Tosað bleiv um komandi sáttmálasamráðingar, sum byrja eftir hálvan august, og hvørji krøvini skuldu verða. Menn vóru sera ónøgdir við tann ásetta karmin.

**13-06-2013 — FSN: Mið og Magn**
Annar blaðfundur til komandi Mið og Magn. Nokk av tilfarið er til blaðið, so tað koyrir á skinnarum í løtuni.

**14-06-2013 — Vinnuhúsið**
Framhald av sáttmálasamráðingunum við Reiðarafelagið fyri farmaskip. Hesin fundur endaði við, at ein semja bleiv undirskriva. Í semjuni stendur millum annað, at partarnir eru samdir um nýggjar lønartalvur, ein fyri farmaskip og ein onnur fyri skip í frálandavinnuni. Nýtt bólkabýti er eisini gjørt. Semjan skal nú innskrivast í sáttmálarnar áðrenn teir verða lagdir út á heimasíðuna.

**17-06-2013 — FMU**
Fundur millum FMU og Sjóvinnustýrið. Fundurin snúði seg serliga um ta sera negativu umtaluna, sum FAS fær í svenskum bløðum. Serliga frá SEKO og NS í Norra. Mett var, at her var talan um at fakfeløg, sum helst kenna tað svárt at missa ræði, serliga í egnum heimasjógvi.

**19-06-2013 — Norðurlandahúsið**
Evnisdagur við heitinum „LÍV í framtíðini". Fundurin byrjaði við, at stjórin Jan Jakobsen bjóðaði vælkomin og kunnaði um gongdina hjá LÍV. Landsstýrismaðurin í vinnumálum kunnaði um ognarviðurskiftini í LÍV og um sølutilgongdina. Jørgen Niclasen kunnaði um framtíðar ætlanir á eftirlønarøkinum. Torben M. Pedersen frá Pension Danmark tosaði um ta optimalu pensjónsskipanina. Møguleikar og avbjóðingar á eftirlønarøkinum komandi árini.

**21-06-2013 — MF: Nevndarfundur**
Átta mál vóru til kunningar. Kunnað bleiv um fund, sum hevði verið á Hotel Føroyum um Skálafjarðartunnilin. Eisini bleiv tosað um mangul uppá maskinmeistarar í føroyska flotanum. Nøkur mál vóru til støðutakan.

**25-06-2013 — ALS-húsið**
Vanligur nevndarfundur í Trygdargrunninum.

**26-06-2013 — Sjóvinnustýrið**
Kunningarfundur vestri í Vágum. Kunnað bleiv um innihaldið í MLC-sáttmálanum. Sýn, góðkenningar, gildiskoma v.m. Útgangsstøði er, at øll skip skulu vera sýnað og hava MLC- certifikat innan 20. august 2013. Hetta er tó ikki galdandi fyri fiskiskip.

**28-06-2013 — Vinnuháskúlin**
Prógvhandan á skúlanum, har 51 lesandi fingu prógv. Sum altíð – ein sera hugnalig og góð løta, nógv fólk var samlað og røður hildnar.

# Royndur maskinmeistari rundar sjeyti

Magnus Holm Petersen er føddur í Havn 2. august 1943. Pápin, Niels Holm Petersen, var úr Kvívík, og mamman Frida var ættað úr Syðrugøtu.

Niels Holm Petersen var skipstimburmaður, hann arbeiddi í nógv ár hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Í 1942 flutti pápin til Íslands, har hann skuldi byggja tríggjar stórar útróðrarbátar. Bátarnir vóru bygdir á Seyðisfirði. Magnus var ikki hálvt ára gamal, tá hann saman við mammuni flutti til Seyðisfjarðar.

Tá tey fluttu aftur til Føroya fekk pápin arbeiði sum skipstimburmaður á Tórshavnar Skipasmiðju.

Um hetta mundi var økið, sum í dag verður nevnt úti í Grønlandi í Havn, stykkjað út. Har keypti pápin grundstykki og í frítíðini bygdi hann húsini í Leivsgøtu, har Magnus er uppvaksin.

7 ára gamal fór Magnus í skúla; tá var bara ein barnaskúli í Havn; hann var í grótbygninginum, sum í dag er ráðhús.



*Liðið hjá B36, sum vann Ísafjarðasúluna í 1965. Aftast frá vinstru: Tórstein Magnusen, Kurt Kristensen, Hugin Samuelsen, Árni Rein, Tórður Holm, Símun Poulsen, Baldvin Baldvinsson og Bjarni Holm. Fremst frá vinstru: **Magnus Holm Petersen**, Ólavur Olsen og Andrass Mikkelsen.*

## Fiskimaður og maskinsmiður

15 ára gamal mynstraði Magnus við sluppini Norðhavið; fiskað varð við snøri undir Íslandi. Hetta man vera ein av teimum seinastu túrunum, at fiskað varð í sjálvdrátti undir Íslandi. Spenningurin var stórur, tá lippurnar vóru taldar einaferð um vikuna.

Her eigur at vera nevnt, at hann eisini hevur roynt seg í útróðri undir Grønlandi.

18 ára gamal fór Magnus í læru í smiðjuni hjá Wenzel Petersen. Lærutíðin var 4½ ár, og 23 ára gamal var hann útlærdur maskinsmiður.

Í 1967 fór Magnus á Maskinskúla. Petur Christiansen, sum seinni gjørdist býráðsformaður í Havn, var skúlastjóri á Maskinskúlanum; tá vóru Maskinskúlin og Sjómansskúlin undir somu lon. Í 1967 gjørdist Magnus maskinist og í 1970 maskinmeistari.

## Maskinmeistari

Magnus hevur drúgvar royndir sum maskinmeistari. Hann hevur siglt við fleiri fiskiskipum, men drúgvastu royndirnar hevur hann við skipum hjá Strandfaraskipum Landsins. Har byrjaði hann sum feriuavloysari við Teistanum; seinni fór hann umborð á Smyril, har hann var settur í fast starv í 1990.

Magnus hevur verið maskinmeistari við núverandi Smyrli, síðani hann varð bygdur í Spania í 2006.

## Góður fótbóltsspælari

At enda eigur at vera nevnt, at Magnus eisini er royndur fótbóltsspælari. Í sekstiárunum spældi hann í nógv ár á besta liðnum hjá B36. Hann var á liðnum hjá B36, sum vann Ísafjarðasúlauna í 1965. Á myndini omanfyri er hann fremsti maður í vinstru síðu





# Føðingardagar

## Skipara- og Navigatørfelagið

| | | |
|---|---|---|
| Tummas Jóhan Sørensen | 02.07.43 | 70 ár |
| Svend Dalfoss | 21.07.43 | 70 ár |
| Mikkjal Samuelsen | 01.08.43 | 70 ár |
| Óla Jákup Fróði Vatnhamar | 20.08.43 | 70 ár |
| Sørin Djurhuus | 27.08.43 | 70 ár |
| Andras Vinther | 17.09.43 | 70 ár |
| Súni T. Olsen | 01.07.1953 | 60 ár |
| Herman K. Joensen | 05.07.53 | 60 ár |
| Erland Mørkøre | 09.07.53 | 60 ár |
| Juul Margar Jacobsen | 16.07.53 | 60 ár |
| Eyðálvur Vang | 30.07.53 | 60 ár |
| Viggo S. Dam | 31.07.53 | 60 ár |
| John V. Petersen | 05.08.53 | 60 ár |
| Arni Hansen | 11.08.53 | 60 ár |
| Mannbjørn í Grund | 13.08.53 | 60 ár |
| Petur Gilbert Gullaksen | 25.08.53 | 60 ár |
| Djóni Joensen | 07.09.1953 | 60 ár |
| Hans Magnus Hansen | 14.09.53 | 60 ár |
| Hans Martin Hansen | 17.09.53 | 60 ár |
| Heini Hans Hendrik Guttesen | 23.09.53 | 60 ár |
| Óla Jákup Kruse | 26.09.53 | 60 ár |
| Pól Arni Poulsen | 03.07.63 | 50 ár |
| Jóhan Petur Jacobsen | 11.07.63 | 50 ár |
| Ólavur Báralíð | 19.07.1963 | 50 ár |
| Jan Toftegaard | 24.07.63 | 50 ár |
| Andras Dánial Jákup Jóanesarson | 31.07.1963 | 50 ár |
| Eyðun Sigmund Mikkelsen | 06.08.63 | 50 ár |
| Eiler Joensen | 15.08.1963 | 50 ár |
| Birgir Hansen | 19.09.63 | 50 ár |
| Tórálvur Kollur Dam | 23.09.63 | 50 ár |
| Selmar Johannesen | 30.09.63 | 50 ár |
| Herleif Johannesen | 05.07.73 | 40 ár |
| Tórálvur Holm í Trøðini | 07.07.73 | 40 ár |
| Kristoffur Dragaberg | 17.07.73 | 40 ár |
| Høgni M. Vest | 08.08.73 | 40 ár |
| Rani Sunason Rasmussen | 14.08.73 | 40 ár |
| Kim Hansen | 24.08.73 | 40 ár |
| Hugo Joensen | 08.09.73 | 40 ár |

## Maskinmeistarafelagið

| | | |
|---|---|---|
| Atli Jensen | 7.07.1933 | 80 ár |
| Carl Nielsen | 16.07.1943 | 70 ár |
| Magnus Holm Petersen | 02.08.1943 | 70 ár |
| Petur Sofus Olsen | 13.08.1943 | 70 ár |
| Marius Jacobsen | 19.07.1953 | 60 ár |
| Torleif Jacobsen | 06.08.1953 | 60 ár |
| Niels Egholm | 26.08.1953 | 60 ár |
| Poul Andrias Joensen | 10.09.1953 | 60 ár |
| Magnus Magnussen | 28.07.1963 | 50 ár |
| Jacob Petur Johannesen | 04.08.1963 | 50 ár |
| Petur Martin Berg | 11.08.1963 | 50 ár |
| Arne Olsen | 17.08.1963 | 50 ár |
| Hallur Johannesen | 31.08.1963 | 50 ár |
| Hendrik Sørensen | 18.09.1963 | 50 ár |
| Bernhard Augustinussen | 19.09.1973 | 40 ár |
| Bárður Michelsen | 28.09.1973 | 40 ár |



2. august verður Magnus Holm Petersen 70 ár

# Føroyskir fiskimenn við útlendskum skipum

Felagið Føroyskir Fiskimenn Uttanlands varð stovnað 21. apríl 1995. Tá felagið varð stovnað høvdu føroyingar, sum sigla við útlendskum fiskiskipum t.d. ikki rætt til sjómannafrádrátt, sum føroyingar, sum sigla við føroyskum fiskiskipum fingu.

Teir sum stovnaðu felagið mettu seg at vera í somu støðu sum fiskimenn, sum sigla við føroyskum skipum, og mettu tí, at mismunur varð gjørdur.

Av tí at fiskimannafrádráttur er vanligur í okkara grannalondum var vandi fyri, at menn fóru at flyta av landinum. Hendi hetta, so fór tað at vera ein dyggur smeitur fyri føroyska samfelagið. Tí varð skattaskipanin broytt, og í dag hava allir fiskimenn rætt til henda frádrátt, eisini teir, sum sigla við útlendskum fiskiskipum.



Jákup Súni Jacobsen, formaður í felagnum Føroyskir fiskimenn uttanlands.



Andy Knudsen; næstformaður í felagnum Føroyskir fiskimenn uttanlands.

## Felagið loysir trupulleikar fyri limirnar

Tað hevur eisini verið ein trupulleiki, at kunngerðir og reglugerðir hava verið broyttar ótaldar ferðir. Sum dømi kann nevnast, at TAKS eitt árið fór at krevja skatt av ferðaseðlum, sum limirnir gjalda, tá ið teir ferðast úr og til Føroya. Tá gjørdi felagið vart við seg, og boðaðu myndugleikunum frá, at limirnir ikki ynsktu at flyta úr Føroyum, men noyddust at ferðast aftur og fram til arbeiðis.

Millum annað hetta er orsøkin til, at limirnir meta tað vera neyðugt at hava eitt felag, sum kann gera vart við hesi viðurskifti. Felagið hevur loyst mangar trupulleikar av ymiskum slag, sum stinga seg upp.

Felagið hevur gott samskifti við føroyskar og útlendskar myndugleikarnar, tí er møguligt at hjálpa limunum, tá limirnir hava brúkt fyri hjálp.

Felagið hevur eisini gott samskifti við føroysku manningarfeløgini.

Limirnir kunnu altíð venda sær til nevndina; nevndarlimirnir kenna tær reglugerðir sum eru galdandi, og tí er vanliga lætt at loysa trupulleikar, sum t.d. hava samband við, at ov nógvur skattur verður kravdur.

## Samla umsiting

Felagið hevur mælt myndugleikunum til, at savna alla umsiting, sum hevur samband við føroyskar fiskimenn, sum sigla við útlendskum skipum. Tað hevði lætt munandi um hjá limunum.

Tá hevði hvør einstakur kunnu avgreitt øll skjøl og váttanir við einari vitjan, heldur enn at vera noyddur til at seta seg í samband við 6 ymiskar almennar skrivstovur.

Felagið hevur eisini vent sær til avvarðandi myndugleikar fyri at fáa greiðu á eftirlønarviðurskiftum hjá sjófólki uttanlands. Tað hevur víst seg at verið møguligt at loyst slíkar trupulleikar, tá føroysk starvsfólk møtast á norðurlendskum fundum í sambandi við t.d. skatta- og eftirlønarmál.



Skipið Asbjørn sum Jákup Súni Jacobsen siglir við.

Enn er kortini ikki komið heilt á mál. Tað sum er umráðandi er, at føroyskir myndugleikar ikki seta tilvildarligar reglur í verk uttan at samskifta við myndugleikar uttanlands; tað kann t.d. vera í Danmark ella Norra, tá ið tað er har, sum trupulleikin liggur.

Tað hevur mangan víst seg, at trupulleikarnir ikki liggja hjá fiskimanninum; hann er bert farin til verka í einum øðrum landi, tí størvini í føroysku fiskivinnuni eru minkaði so nógv í tali seinastu mongu árini.

## Jákup Súni Jacobsen formaður felagsins

Jákup Súni Jacobsen, formaður felagsins, er maskinmeistari, hann var útlærdur maskinsmiður í 1996; hann stóð í læru hjá Maskinmiðstøðini í Kollafirði. Lærumeistari var Niels Juul Kristiansen.

Hann tók maskinmeistaraprógv á Maskinmeistaraskúlanum í 2001. Hetta var áðrenn Sjómansskúlin og Maskinmeistaraskúlin vóru lagdir saman til Vinnuháskúlan.

Jákup Súni var fyrsta túrin til skips við Arctic Viking. Hetta var ein drúgvur túrur; hann mynstraði í Sukurtoppinum í Grønlandi 24. juni 1989, og var heima aftur til jóla sama árið. Tá fiskaði Arctic Viking í kanadiskum sjógvi.

Síðani 2002 hevur Jákup Súni verið við danska uppisjóvarskipinum Asbjørn; skipið lastar gott 1.300 tons. Meginparturin av manningini eru føroyingar. Men teir eru bara tveir, sum búgva í Føroyum. Hinir hava valt at flyta til Danmarkar; teir búgva í Hirtshals ella har á leið. Reiðaríið hevur fyri stuttum keypt eitt størri skip í staðin fyri Asbjørn.

## Heimasíða, Facebook og limagjald

Felagiðið hevur heimasíðu: www.fiskimenn.fo og ein bólk á Facebook, sum er avmarkaður til limir felagsins t.v.s. siga at einans limir hava atgongd.

Limagjaldið er einans 200,- kr. um árið. Tað skal gjaldast á koto hjá EIK: 9181 44 20 27 8

## Nevndarlimir felagsins

Jákup Súni Jacobsen, formaður: Telefon 22 93 51, jakupsj@hotmail.com
Andy Knudsen, næstformaður: Telefon 76 56 56, aknudsen@olivant.fo
Jens Andru Zachariasen: Telefon 33 34 34, midjaz@gmail.com
Tiltakslimur: William Hansen; hansenwilliam51@hotmail.com
Tiltakslimur: Bennie Højgaard; teldupostur: joerundur@hotmail.com

# Maskinmeistarar á norðurlendskum fundi í Føroyum

Samtakið fyri norðurlendsk maskinmeistarafeløg, NMF, hevði fund í Føroyum 6. og 7. mai undir góðum umstøðum í Kaffihúsinum í Vágsbotni í Havn.

Á fundinum vóru umboð fyri Danmark, Noreg, Svøríki, Finland, Ísland og Føroyar. Luttakararnir á fundinum vóru 11 í tali.

Á slíkum fundum hittast kolegar úr Norðanlondum, og møguligt er at skapa persónlig sambond, sum hava stóran týdning – ikki minst – tá talan er um altjóða samstarv í altjóða felagskapum.

Á hesum fundum merkist, at møguligt er at samstarva á fleiri ymiskum økjum.

Her er møguligt at hoyra ymisk sjónarmið til viðurskifti, sum eisini hava týdning í Føroyum.

Á fundinum greiddu limafeløgini frá hvørjum tey arbeiða við í løtuni og, hvat rørdist í hvørjum landi sær t.d. hvussu maskinmeistaraútbúgvingarnar eru samansettar og, hvussu hesar kunnu mennast.

Eisini var orðaskifti um, hvussu útbúgvingarnar kunnu nærkast soleiðis, at tær blíva meira eins í øllum Skandinavia. Greitt varð eisini frá sáttmálaviðurskiftum í hvørjum landi sær, og um fundir í felagsskapum, sum t.d. ITF, IMO og NTF. Stjórin á Vinnuháskúlanum Vilhjálmur Gregoriussen var gestur á fundinum, hann greiddi frá framtíðar útbúgvingum á Vinnuháskúlanum, eisini greiddi hann frá Manilla conferansuni, STCW og Bologne tilgongdini. Ein avtala millum limalondini í NMF um limaskap hjá hvørjum øðrum var eisini til viðgerðar. Nakað av orðaskifti hevur verið um hesa avtaluna, men nú er semja millum londini. Avtalan er góðkend av nevndunum í hinum norðurlandinum, og kom í gildi 1. juli 2013. Semja var eisini um framtíðar málsetning fyri NMF. Tað vóru eisini stundir til ein túr fyri Vestan, saman við nøkrum av gestuum,vit vóru hepnir við veðrinum so túrurin eydnaðist væl.

Næsti NMF fundur verður í Reykjavík í september. Tá verður tað kongress, sum er triðja hvørt ár í felagsskapinum; tá verður eisini nýggjur presidentur valdur.



Fundarluttakarar frá vinstru: Halldor A. Gudmundsson, Ísland. Gudmundur Ragnarsson, Ísland. Gustav Schmidt Hansen, Danmark. Jón Johansen, Maskinmeistarafelagið. Sjúrður Heinesen, Maskinmeistarafelagið. Per Jørgensen, Danmark. Sami Uolamo, Finland. Leif Wikstrøm, presidentur í NMF, Finnland. Odd Rune Malterud, Norra. Páll Hansen, Maskinmeistarafelagið og Mikael Huus, Svøríki.



*Skipað var fyri einum sera væl eydnaðum túri fyri Vestan.*

## Tíðindaskriv frá fundinum

6. og 7. mai hevði samtakið fyri norðurlendsk maskinmeistarafeløg fund í Føroyum. Í tíðindaskrivi varð greitt frá fundinum:

Nordiska Maskinbefälsfederationen (NMF) som representerer over 30 000 maskinbefal har avholdt sekretariatsmøte i Torshavn, Færøyene i tiden 6-7 mai 2013

På møtet uttrykket NMF bekymring for de nordiske landenes administrasjon manglende samarbeidsevne i forbindelse med rekruttering, utdanning og sertifikat utstedelse.

NMF mener at de respektive administrasjoner i de nordiske land, sammen med næring og respektive forbund snarest må gjennomgå og kvalitetssikre STCW konvensjonens intensjoner om en tilnærmet ens opplæring, tidsvindu og sertifisering som gjelder WW.

I dag ser en alt for ofte grunnet manglende kunnskap at utveksling av nordisk mannskap ikke lar seg gjøre, da forutsetningene for et endorsment iht. den enkelte flaggstat ikke tilsynelatende er tilstede.

NMF viser i så måte bla. til STCW 2010 Manila resolusjon som omhandler en transparent holdning i forhold til forhindring av sertifikatjuks og falske dokumenter, også må komme denne delen til gode, for å sikre de nordiske studenter, lærlinger og kadetter en forutsigbarhet i sin lange utdanning frem til STCW sertifikater.

Lignede transparente løsninger finner en også i BOLOGNA prosessen med hensyn til Europeisk Quality Framework (EQF) hvor de Europeiske landene har sammenfattet en felles utdanningsplattform på tvers av landegrensene.

NMF kan ikke se at sjøfolk skal

behandles annerledes og ser for seg ensforent dokument hvor det tydelig kommer frem hva som er akseptert og evt. hva som ikke kan aksepteres, slik at de respektive nordiske land forvalter konvensjonen på samme måte.

### Gjensidghetsavtale

Det norske maskinistforbund, Finlands Maskinbefälsförbund, Maskinmeistarefelagid, Maskinmestrenes Forening, VM – felag velstjora og malmtaeknimanna og Sjöbefälsföreningen er enige om at maskinbefal uavhengig av hjemland har anledning til å være medlemmer av maskinistforbundet i det land hvor skipet er innregistrert.

Forutsetningen for at maskinbefal kan overflyttes mellom de respektive organisasjoner er at skyldig kontingent skal være betalt i det fraflyttede forbund/forening. Ved overflytting medtas opparbeidet ansiennitet og vedkommende opptas i det nye forbund/forening med de plikter og rettigheter denne nå sammenlagte ansienniteten medfører.

Opptagelse skal i hvert tilfelle skje i overensstemmelse med de opptaksbestemmelser som er fastlagt i de enkelte forbunds/foreningers lover og bestemmelser.

Hvis søknad om medlemskap blir avslått kan medlemskapet fortsette i det fraflyttede forbund/forening.

Ved utbetaling av understøttelser i det nye forbund/forening, skal det tas hensyn til eventuelt utbetalt understøttelse i det fraflyttede forbund/forening både forsåvidt angår understøttelsens størrelse og tidsrommet som det er betalt understøttelse for.

Denne avtale kan sies opp med 6 mån eders varsel av en av organisasjonene med anbefalt brev til de øvrige.

# Norðurlendsk Navigatør-kongress á Viðareiði

Føroya Skipara- og Navigatørfelag var vertur, tá Norðurlendsk Navigatørkongress varð hildin á Hotel Norð á Viðareiði 4. og 5. juni 2013.

Fast evni á kongressini er, at londini greiða frá, hvat rørir seg innan sjóvinnu øki í einstøku londunum.

Endamálið við hesi kunning er, at so kunnu feløgini læra av royndunum hjá hvørjum øðrum.

*Umboð fyri Klaksvíkar dansifelag greiddi sera væl frá føroyskum dansi.*





*Fundarluttakarar í góðveðri á Viðareiði*

**Stuttur samandráttur úr tí sum kom fram:**

### Noreg

Framhaldandi royna norsku manningarfeløgini at steðga sosialari dumping á norska landgrunninum og á norsku strondini. Hetta er tá undirlønt fremmand arbeiðsmegi arbeiðir í norsku oljuvinnuni og í strandasigling. Teir royna at fáa lógarásett, at ongin skal arbeiða fyri minni enn sáttmálalønina.

### Danmark

Greitt var frá sakarmálinum, sum Søfartes Ledere hevur reist móti Reiðaríforeiningi og Statinum um manglandi lønarkompensatión til DIS-arar av skattalættanum, sum allir aðrir danir fingu fyri tveimum árum síðan.

### Svøríki

Nærum allur tann svenski handilsskipaflotin er útflaggaður, millum annað til FAS. Hetta kemst av, at reiðaríini ikki gjalda tonnnaguskatt, men vanligan partafelagskatt. Hetta ger, at svenska skipanin als ikki er kappingarfør við onnur lond. Ein kommisón er sett at gera eitt tilmæli um, hvussu hetta fæst í rættlag aftur, men hetta verður í fyrsta lagi á heysti 2014

### Finnland

Finski handilsflotin er flaggaður innaftur nú teir hava fingið eina skipan við tonnaguskatti. Finsk reiðarí hava nógvar nýbygningar í ger. Stór misnøgd er um, at ísbrótaratænastan er privatiserað og skipini farin undir Estlendsk flagg og lønarlag.

### Fundarluttakarar

**Umboð fyri Danmark:**
Fritz Ganzhorn
Mille Bondo Meyer

**Umboð fyri Svøríki:**
Jørgen Lorén
Christer Lindvall
Hans-Dieter Grahl

**Umboð fyri Føroyar:**
Eyðstein Djurhuus
Annfinn Garðalíð
Regin Nónstein
Andrias V. Højgaard

**Umboð fyri Finland:**
Petri Suominen
Veikko Engren

**Umboð fyri Noreg:**
Morten Kveim
Ove Nielsen
Rune Larsen Røine: Skrivari



*Gestirnir sluppu at royna seg í føroyskum dansi.*



*Fundarluttakarar frá vinstru: Regin Nónstein, Annfinn Garðalíð, Morten Kveim, Veikkio Engren, Jørgen Loren, Fritz Ganzhorn, Hans- Dieter Grahl, Rune Larsen Røine, Ove Nielsen, Mille Bondo Meyer, Petri Souminen, Eyðstein Djurhuus, Christer Lindvall.*

## Føroyar

Greitt var frá trætuni um makrel og sild í Norðurhøvum og hóttanina um tiltøk ímóti okkum. Eisini varð nomið við trupulleikan, sum vit hava í farma- og frálandavinnuni har sáttmálin er bert eitt slag av minstuløn. Nógv orðaskifti varð um hendan trupulleika, tað er sera ymiskt, sum londini síggja uppá hetta.

## Ísland

Ísland mátti orsaka av heilt serligum umstøðum geva avboð stutt áðrenn fundin.

## Feløgini, sum eru limir í Norðurlendska felagsskapinum

- Félag Skipstjórnarmanna, Ísland.
- Norsk Sjøoffisersforbund, Noreg.
- Søfartens Ledere , Danmark.
- Finlands Skeppsbefälsförbund, Finland.
- Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroyar.



# Stovnsrøkt við agni og húki

Feitur toskur og feit hýsa dámar betri høgguslokk og gággu, men stórur fiskur dámar mest makrel og sild

Ber til at stýra fiskiskapinum við línu við at brúka ymisk sløg av agni og ymsar støddir á húki?

Tað var spurningurin, sum Petur Steingrund og Sigvald Kristiansen settu sær fyri at kanna í sambandi við Havstovuna.

Úrslitið vísti, at tað er bara í ávísan mun, at stórur toskur og stór hýsa taka størri húk enn smáur fiskur, siga teir báðir í smáriti, Havstovan hevur gjørt um kanningina.

Hinvegin hevði agnslagið nógv at siga fyri støddina og eisini, hvussu feitur fiskurin var.

## Minka munandi

– At brúka stóran húk og fiskaagn (t.v.s. makrel ella sild), hevði minkað munandi um nøgdina av smáfiski á línuni við tað, at miðalstøddin á toskinum møguliga hevði økt við 6 til 10 sentimetrar.

Men tíverri hevði hetta eisini ført til munandi minni fiskiskap, ella veiði, upp á húkin.

– Fyri hýsu vóru bert umleið 2 sentimetrar at vinna við at brúka fiskaagn, men fiskiskapurin hevði neyvan minkað.

Teir báðir vísa á, at síðani 2006 hevur fiskiskapurin eftir toski og hýsu verið søguliga lítil.



*Húkastøddirnar, sum vórðu brúktar í agn-húkaroyndini. Frá vinstru: EZ 10, EZ 12 og EZ 13.*

*Royndarætlanin við trimum húkastøddum blandaðar saman á hvørjari línu (stampi), og har sama agn (høgguslokkur, gágga, makrelur ella sild) varð nýtt fyri hvørja línu.*

Hinvegin fekk Havstovan fígging til tvær verkætlanir, har onnur verkætlanin var at kanna, hvørja ávirkan húkastødd og agn høvdu á støddina av toski og hýsu, sum vórðu fiskað við línu.

Royndirnar vórðu gjørdar við útróðrarbátinum, Tóra, sum er ein Awi 38 fót bátur og brúkt vórðu fýra sløg av agni, tvey sløg av lindýrum, gágga og høgguslokkur og tvey sløg av fiski, makrelur og sild.

Teir brúktu tríggjar støddir á húkum, EZ 10, sum er mest vanligi húkurin hjá smáu útróðrarbátunum, og harafturat, EZ 12 og EZ 13 húkar.

Stállínuskip brúka vanliga EZ 12 húkin, men tann størsti húkurin, EZ 13, verður vanliga ikki brúktur í føroyska línufiskiskapinum.

Útróðrarmenn brúka ofta gággu til agn, tí tað er ókeypis við tað, at teir fiska sjálvir gágguna.




*M/B Tóra, sum varð nýttur til agn-húkaroyndirnar.*

Teir brúka eisini hogguslokk og makrel, men lítið av sild.

Royndir vórðu gjørdar á tveimum økjum, í Álinum í ein landnyrðing úr Nólsoy, og í Nólsoyarfirði ímillum Streymoy og Nólsoy.

Royndirnar vórðu gjørdar frá 14. oktober 2011 til 14. september 2012 og tilsamans vórðu ellivu túrar gjørdir í Álinum og tíggju í Nólsoyarfirði, ella 21 túrar tilsamans.

Yvirskipað varð kannað eftir um ein ávís húkastødd, við einum ávísum agni, vísti eitt heilt serstakt úrslit, men einki slíkt samanspæl var tó at finna, siga teir báðir granskararnir.

## Blandað úrslit

Tilsamans fingu teir 11 fiskasløg, men nógv tað mesta var hýsa og toskur.

Mest var at fáa um heystið.

– Toskur í Álinum var javnt býttur millum agnsløg og húkastøddir, men toskur í Nólsoyarfirði tók nógv oftari gággu og hogguslokk enn hini øgnini.

– Sera nógv var at fáa av hýsu í Álinum, serliga um heystið á makreli, men munandi minni var at fáa í Nólsoyarfirði og ikki ein hýsa varð fingin á vári í 2012 í Nólsoyarfirði.

Úrslitið av hesi royndini var, at toskur í Álinum tók ikki øll øgn líka, við tað, at tann smái toskurin tók helst gágguagn.

Eisini var smærri fiskur á teimum smáu húkunum.

Tann smái toskurin í Nólsoyarfirði, sum tó var nakað størri enn í Álinum, tók eisini helst gágguagn, men hinvegin hevði húkastøddin einki at siga fyri fiskastøddina.

Hýsan í Álinum gjørdi eisini mun á øgnum við tað, at tann stóra hýsan helst tók sildaagn. Har hevði húkastøddin týdning, tí tann smáa hýsan var oftari á smáa húkinum.

Hýsan í Nólsoyarfirði, sum var munandi størri enn í Álinum, gjørdi eisini mun á øgnum við tað, at tann stóra hýsan helst tók makrel- og sildaagn.

Annars hevði húkastøddin onga ávirkan á fiskastøddina.

## Kannaðu fitina

Í hesi royndini varð eisini kannað eftir, hvussu feitur fiskurin er. Í hesum sambandi kannaðu tey konditiónsfaktorurin.

Hann verður roknaður soleiðis, at longdin í sentimetrum, verður býtt tríggjar ferðir upp í vektina í grammum og síðani verður úrslitið faldað við 100.

Ein vanligur toskur hevur ein konditiónsfaktor á 1,0, men ein sera feitur toskur liggur á 1,2, og ein slánur á 0,7.

Smáur fiskur hevur ofta hægri konditiónsfaktor enn stórur fiskur.

Konditiónsfakturin hjá toski í Álinum var ikki ávirkaður av agnslagi, men av húkastødd, við tað, at tann feiti toskurin tók teir stóru húkarnar.

Úrslitið var øvugt fyri tosk í Nólsoyarfirði, tí har hevði húkastøddin einki at siga fyri konditiónsfaktor, men tað vísti seg, at tann feiti toskurin tók gággu.

Konditiónsfaktorurin hjá hýsu í Álinum var ávirkaður av agnslagi við tað, at tann raka hýsan tók mest gággu.

## Onki at siga

Húkastøddin hevði einki at siga fyri konditiónsfaktorin hjá hýsuni í Álinum. Konditiónsfaktorurin hjá hýsu í Nólsoyarfirði var eisini ávirkaður av agnslagi við tað, at tann feita hýsan tók meira hogguslokk enn hini øgnini.

Húkastøddin hevði heldur einki at siga fyri konditiónsfaktorin hjá hýsuni í Nólsoyarfirði.

Tann smái toskurin tók gággu, men tann stóra hýsan tók makrel ella sild.

Bara viðhvørt hevði húkastøddin nakað at siga fyri støddina á toski, og tað sama var galdandi fyri hýsu, og tað var, tá ið hýsan sum heild var smá og her verður tosað um hýsu í Álinum.

Tann feiti toskurin hevði lyndi til at taka gággu, meðan tann raka hýsan í Álinum hevði lyndi til at taka gággu og tann feita hýsan í Nólsoyarfirði tók mest hogguslokk.

Stórur toskur og stór hýsa hevði lyndi til at taka fiskaagn og smáur fiskur lindýraagn.

Hinvegin hevði feitur toskur, og kanska eisini feit hýsa, lyndi til at taka lindýraagn men tann rakari fiskur hevði lyndi til at taka fiskaagn.

Húkastødd hevði bara viðhvørt nakað at siga fyri fiskastødd og hvussu feitur fiskurin var.

## Avmarkað

Eitt høvuðsendamál við royndini við agni og húki var at vita, um tað bar til at sleppa undan at fiska smáfisk við at brúka størri húk.

Úrslitini vístu, at hetta bar bara til í avmarkaðan mun við teimum húkastøddum, sum brúktar vórðu í royndini.

Hóast miðalstøddin á toski í Álinum í ávísum førum var minni á smáu húkunum, var stór spjaðing í, soleiðis at smáur fiskur kundi taka stóran húk og stórur fiskur smáan húk.

Heldur ikki var sama úrslit fyri Álin sum fyri Nólsoyarfjørð, har húkastødd onga ávirkan hevði.

Fyri hýsu var sama úrslitið.

Men Petur Steingrund og Sigvald Kristiansen siga, at kanska kundi ein enn størri húkur verið nýttur, sum gjørdi, at lítið av smáum fiski kom á línuna.

Talva 1. Stødd (vekt í g) á øgnunum, sum vórðu nýtt í agn-húkaroyndini. Legg til merkis, at gágguøgnini vóru nakað minni enn hini øgnini. 30 øgn av hvørjum slagi vórðu kannað.

| Slag av agni | Miðalvekt | St.frávik | Minsta | Størsta |
|---|---|---|---|---|
| Høgguslokkur | 26.4 | 7.8 | 16.4 | 48.2 |
| Gágga | 16.0 | 5.3 | 8.3 | 28.9 |
| Makrelur | 24.9 | 5.2 | 15.5 | 37.7 |
| Sild | 27.4 | 5.9 | 19.2 | 44.2 |
| Undir einum | 23.7 | 7.6 | 8.3 | 48.2 |




*Tey bæði økini (Álurin og Nólsoyarfjørður), og hvar línurnar vórðu settar. Ein strika vísir til hvønn túr, har fýra línur (stampar) vórðu settar. Seta 7 hoyrdi til Nólsoyarfjørð og seta 15 til Álin.*

– Tá hevði veiðan tó helst verðið minni.

Hinvegin vísti tað seg, at agnið hevði meira at siga enn húkastøddin.

– Væntast kann, at fiskaagn er feitari enn lindýraagn, men skal tað staðfestast, krevjast fleiri kanningar.

At bæði stórur toskur og stór hýsa høvdu lyndi til at taka fiskaagn er í góðum samsvari við magakanningar.

– Toskur á nógvum havleiðum skiftir frá at eta krabbadýr til at eta fisk, tá hann gerst stórur, og sama tykist vera galdandi fyri hýsu.

Granskararnir siga, at hetta kann gera úrslitini torfør at greina, tí tað kann vera ógreitt, um tað er støddin ella konditiónsfaktorurin, sum gera, at ein ávísur fiskur tekur eitt ávíst agn.

Í hesum kanningum er støddin hildin at ávirka mest.

– Ávirkanin av konditiónsfaktori er tí roknað sum tann eyka ávirkanin, sum konditiónsfaktorurin hevur, tá ávirkanin av longd longu er tikin við.

– Feitur toskur og feit hýsa hevði lyndi til at taka lindýraagn heldur enn fiskaagn, og tað er eitt sindur løgið. Kanska hevur slíkur feitur fiskur longu fingið nóg mikið av feitti og hevur brúk fyri øðrum føðsluevnum, sum hann kann fáa úr lindýraagni.




*Høvuðsúrslit frá agn-húkaroyndini: hvussu agnslag og húkastødd ávirkaðu longd og konditiónsfaktor (K) hjá toski og hýsu, bæði í Álinum og í Nólsoyarfirði. Miðallongdin (cm) og miðalkonditiónsfaktorur eru eisini víst.*

## Fiskaagn og stóran húk

Petur Steingrund og Sigvald Kristiansen staðfesta, at fyri at sleppa undan smáfiski er tí best at royna við fiskaagni og at hava stóran húk.

– Við hesum kann miðalstøddin á toskinum økjast 6 til 10 sentimetrar, -6 sentimetrar í Nólsoyarfirði og 10 sentimetrar í Álinum- og tað munar nógv. Tíverri hevði hetta helst ført til ein munandi verri fiskiskap, serstakliga í Nólsoyarfirði.

Fyri hýsu eru tó bert einir 2 sentimetrar at vinna við hesum framferðarhátti.

Men fingu útróðrarmenn ikki loyvi at royna við gággum hevði tað óivað komið illa við hjá teimum, tí so máttu teir keypt alt agnið, umframt at minni hevði verið at fingið av toski nær landi.

Teir báðir granskararnir halda, at framtíðar royndir við agni og húki kundu miðað eftir at havt øgnini meira jøvn í vekt enn í hesi royndini.

– At smáur fiskur tók gággu, kann eisini komast av, at gágguagnið var minni enn hini øgnini.

Teir leggja afturat, at hinvegin vóru øgnini í hesi royndini ein endurspegling av, hvat fiskiflotin nýtir, og tí kunnu úrslitini í hesi royndini flytast beinleiðis yvir á fiskiflotan.





# Grønlands-fiskiskapurin tekur seg upp


Tummas við Kráir


Napoleon Andreasen

Í 1906 gjørdu føroyingar fyrstu fiskirannsóknina undir Grønlandi. Tað var havnarmaðurin Napoleon Andreasen, sum í avtalu við danskar myndugleikar stóð fyri hesi fyrstu royndini. Napoleon Andreasen var reiðari og navigatørur; vanliga varð hann nevndur Poli í Dali.

Av tí, at hetta ikki var roynt áður mettu danskir myndugleikar hetta vera so mikið áhugavert, at teir vildu stuðla fíggjarliga. Men teir settu eisini treytir. Teir kravdu m.a. at tveir grønlendingar sluppu at vera umborð soleiðis, at teir kundu læra av føroyingum. Teir góðtóku at føroyingar fóru í land í Grønlandi, men teir máttu ikki handla við grønlendingar.

## Havgásin og Karin

Poli í Dali hevði hug at fara við egnum skipi, og valdi sluppina Karin, sum var deyðsiglari. Men hann metti ikki, at tað var ráðiligt at fara slíka ferð við einum skipi. Poli ráðførdi seg tí við vágbingin Tummas við Kráir. Tummas helt hetta vera áhugavert og hevði hug at vera við um hann fekk Havgásina hjá Garðamonnum at føra. Tað var ongin trupulleiki; Garðamenn høvdu hug at leggja skip til, og Tummas fekk Havgásina at føra.

Sum nevnt vildu danskir myndugleikar stuðla fíggjarliga, og nú var avtalað, at hvørt skipið skuldi fáa 15.000,- kr. sum trygd til ferðina. Fiskaðu skipini fyri meira enn 15.000 kr. í part, skuldi skipið eiga helvtina av tí, sum omanfyri var, og hin helvtin skuldi gjaldast Grønlandsmálaráðnum.

Ferðin var hildin at vera so mikið vágin, at Jákup Dahl fekk ikki Havgásina tryggjaða hjá tryggingarfelagnum í Suðuroy, og mátti tí til Havnar at fáa trygging.

## Manningarnar

Ein av teimum, sum var við „Karin", var Rudolf Jensen av Sandi. Hann hevur í samrøðu nevnt nakrar av teimum, sum vóru við á ferðini: Andrias Jensen og Diss Arge úr Havn. Hjalgrím Hentze og Esmar Poulsen úr Hesti. Jógvan Hendriksen úr Vík og Tróndur Olsen úr Kollafirði. Í løtuni vita vit ikki um aðrar, sum vóru við á ferðini, men ivaleyst finna tey, sum hava áhuga nøvnini á øllum í Skjalasavninum á Debeartrøð.

## Ferðin til Grønlands

Havgásin og Karin fóru av Havnini 22. mai 1906, og ferðin til Grønlands tók 18 dagar. Veðrið var gott allan vegin, og skipini høvdu samband hvørt við annað hvønn dag.

Komnir undir land í Vesturgrønlandi varð avrátt at fara inn í Holsteinsborg. Har var møguligt at fáa samband við danskar myndugleikar, tá tørvur var á tí. Teir báðir grønlendingarnir, sum skuldu vera við til fiskiskap fóru báðir umborð á Havgásina.

## Fiskiskapurin

Bæði skipini royndu fyrstu 6 vikurnar á Stóra Hellefiskabanka. Har fingu tey væl av kalva, men ongan tosk. Kalvafiskurin varð turrsaltaður, og ravarnir lakasaltaðir. Roynt varð eisini at rógva út við bátum, meðan skipini lógu inni í Holsteinsborg. Har fingu teir tann tosk, sum teir fingu á túrinum; 1.800 í tali.

Eina stutta tíð lógu skipini í Jacobshavn, meðan teir róðu út við báti. Tá varð roynt eftir hellufiski, men av tí, at teir ikki fingu tunnur, noyddust teir at gevast. Í Grønlandi var veðrið gott alla tíðina.

> Naar jeg skal udtale mig om Torskefiskeriet ved Grønland og bruge de i Sommeren indhøstede Erfaringer som rettesnor, saa vil jeg paa det bestemteste fraraade enhver Udlænding at gaa til Grønland med den ene Tanke absolut at faa Torsk, thi i den Retning vil han sikkert ligesom jeg i mange Tilfælde blive sørgeligt skuffet

## Heimferðin

Teir fyrstu dagarnir av heimferðini var av fínasta veðri. Komnir hálva leið skiltust skipini, tá stormur brádliga kom á teir av vestri.

Í ódnarveðrinum fekk Karin ein sjógv, og mátti leggja stilt eina nátt.

Í aðrar mátar gekk heimferðin væl.

Bæði skipini fingu fyrst Mykines í eygsjón. Havgásin var tann fyrra, teir valdu at sigla norðanfyri Mykines og stevndu so gjøgnum Djúpini. Tað gjørdi Karin eisini. Men ikki fyrr enn nú sóu teir á



*Havgásin*

Havgásini, at Karin var í hølunum á teimum.

### Poli ikki rættuliga nøgdur

Heimafturkomin skrivar Poli frágreiðing til Innlendismálaráðið um royndarfiskiskapin:

Naar jeg skal udtale mig om Torskefiskeriet ved Grønland og bruge de i Sommeren indhøstede Erfaringer som rettesnor, saa vil jeg paa det bestemteste fraraade enhver Udlænding at gaa til Grønland med den ene Tanke absolut at faa Torsk, thi i den Retning vil han sikkert ligesom jeg i mange Tilfælde blive sørgeligt skuffet, thi jeg har aldrig paa noget Sted prøvet længere og mere ihærdigt efter at faa Fisk end her paa Grønlands Kyst og saa til Belønning opnaaet et daarligere Resultat. Jeg udtaler mig kun, om hvad jeg har erfaret og om de Steder, hvor jeg har prøvet at fiske, men jeg mener dog, at det vilde være heldigt, om Grønlændere blev oplært til at tilvirke Torsken saaledes, at den kunde blive Markedsvare, da disse (Grønlændere) altid ere tilstede og saalededs vil være i Stand til at benytte Øjeblikket, om mulige Stimer skulde sætte ind.

Um kalvafiskiskapin skrivar hann soleiðis: Efter den foreliggende Prøve at dømme, tror jeg ikke, at der er saa rigeligt med Helleflyndere, at det vilde lønne sig at indrette Skibe til Transport af denne Artikel i fersk Tilstand, men jeg mener, at dersom man først kunde finde et lønnende Marked, hvor Fisken kunde afsættes i saltet Tilstand, og dernæst faa oplært Grønlænderne til at fange de, saa vilde der langs Kysten kunne opfiskes mange Tons, der kunde saltes og pakkes i Kasser, indeholdende ca. 100 a 200 Pund, hvilket vilde letteligøre Transporten.

### Danir kortini væl nøgdir

Danskir myndugleikar skriva seinni m.a. soleiðis um føroysku royndirnar: Stor betydning for hellefiskeriet og for grønlændernes fiskeri i det hele taget fik de fiskeriforsøg, som den færøske skibsreder Napoleon Andreasen i juni-august foretog i nærheden af Jakobshavn med sine to kutter Karen og Havgasin.

Forsøgene faldt heldigt ud, og da det var første gang, langliner anvendes i Grønland, fik de grønlandske fiskere derved lært brugen af dette redskab, hvilket siden fik stor betydning.

Og so ein góður endi: Denne udtalelse må tillægges betydelig vægt i betrakning af, at de færøske fiskere er spcialister i den form for fiskeri, tað er línuveiðan.






betri.fo

Fá upp til
32% í avsláttri

Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við største vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.





Hevur tú spurningar, ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón


lív.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Persónlig eftirløn
Lívið lagar seg ymiskt fyri okkum øll. Tí hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønum. Sum Føroya størsta og royndasta eftirlønarfelag, veitir Lív tær eina persónliga eftirløn. Vit hjálpa
tær at laga tína eftirløn til tað lív, tú vilt liva og til ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á liv.fo og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Innlit í útlit
ekko 239 239